# Skíðkapping í bestu líkindum í Klaksvík

**Veðrið var av tí besta til at aka á skíð, og nógv fólk – bæði kvinnur og menn – vóru við í kappingini, sum Klaksvíkar Skíðfelag skipaði fyri seinnapartin sunnudagin**



*Nógvir áskoðarar vóru til skíðkappingina í Klaksvík sunnudagin*

SKÍÐKAPPING
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað er ikki á hvørjum degi, at skipað verður fyri skíðkapping her á landi. Klaksvíkingar plagdu at skipa fyri skíðkappingum, men nú eru tað liðin 10 ár, síðani seinasta kappingin varð hildin.

Farnu vikuna hevur tjúkkur kavi ligið í Klaksvík, og sunnudagin vóru líkindini so góð, at Klaksvíkar Skíðfelag aftur skipaði fyri eini kapping. Kappast var bæði á skíðum, á kavafjøl og í sletu.

Bæði vaksin og børn kappaðust, og samanlagt vóru eini 70 luttakarar við í teimum ymsu kappingunum.





*Tey fremstu í teimum ymsu kappingum fingu heiðursmerki frá fyrireikarunum*
*Mynd: Norðlýsið*

### Nógvir áskoðarar

Skíðkappingin var høvuðskappingini, og har var kappast í fleiri bólkum – kvinnur, menn og dreingir – og teir flestu luttakararnir vóru í kappingini hjá monnum.

Mogens Petersen vann kappingina hjá monnum, Jóan Magnus Johannesen varð nummar 2 og Jan B. Andreassen var nummar 3.

Hjá kvinnum var Fríðunn Steinberg, hjá eldru dreingjunum vann Hans Jacob Joensen, og hjá teimum yngru vann Rói Clementsen.

Nøgvir áskoðarar vóru til skíðkappingina, og teir savnaðust við málið, sum varð niðast á Langubrekku – á Hædd. Skíðararnir byrjaðu á Hálsi, og tann skjótasti kláraði teinin upp á 2,34 minuttir.

# FM og úttøkukapping á 12 metrum

**Dagin eftir 15 ára føðingardag sín skipaði Bogaskjótifelagið Ørvur í Runavík fyri føroyameistara kapping fyri ung á 12 metra frástøðu. Hetta var samstundis seinasta úttøkukappingin til luttøku í DM fyri ung**




*FM í compound fyri ung. Frá vinstru Bogi Ákason, Vágaskot, Sjúrður Rein, Tambar, og Tummas Eidesgaard, Vágaskot*




*FM í recurve fyri ung. Frá vinstru Magnus Andreassen, Kristoffer Andreasen og Kaj Johannesen, allir úr Ørvi*

BOGASKJÓTING
*Tíðindaskriv*

Sunnudagin varð kapping í bogaskjótin í Runavík. Hesaferð vóru tað ungir skjúttar, sum skuldu kappast um FM og møguleikan at sleppa við til DM fyri ung.

### Compound

Her vóru bert fýra luttakarar, men vóru teir sera knáir og javnir. Í innleiðandi umfarinum vóru úrslitini: nr. 1 Magnus Andreassen (283+286) 569 stig og persónligt met (P), nr. 2 Kaj Johannesen (280+284) 564 stig, nr. 3 Kristoffer Andreasen (279+284) 563 stig og nr. 4 Helgi Lamhauge (276+273) 549 stig P.

Við hesum úrslitum hava allir fýra megnað krøvini til luttøku í DM fyri ung, sum verður seinasta vikuskiftið í mars. Magnus, Kaj og Kristoffer fara at luttaka í bólkinum kadet og Helgi í bólkinum mini.

Í hálvfinalunum vóru úrslitini: Magnus-Helgi 114-102 og Kaj Kristoffer 112-114.

Bronsufinalan: Kaj-Helgi 110-108.

Gullfinalan: Kristoffer-Magnus 112-110 og bleiv Kristoffer Andreasen sostatt føroyameistari 2006. Allir eru úr Ørvi.

### Recurve

Her vóru 16 luttakarir og sum væntað frammanundan var tað Sjúrður Rein, Tambar, sum legði seg klárt á odda. Men skal sigast, at 12 av 16 skjúttum settu persónlig met. Í innleiðandi umfarinum vóru fýra tey bestu úrslitini: nr. 1 Sjúrður Rein, Tambar, (277+274) 551 stig P, Bogi Ákason, Vágaskot, (247+269) 516 stig P, nr. 3 Eirikur á Kletti, Tambar, (248+237) 485 stig P og nr. 4 Nikkel Petersen, Ørvur, (233+209) 442 stig.

Við sínum úrsliti hevur Sjúrður Rein eisini megnað kravið til luttøku í DM fyri ung. Hann fer at luttaka í bólkinum kadet.

Í hálvfinalunum vóru úrslitini: Sjúrður-Tummas Eidesgaard, Vágaskot, sum annars beliv nr. 5 í innleiðandi umfarinum, 114-70 og Bogi Á.-Eirikur 107-102.

Bronsufinalan millum Tummas og Eirik gjørdist sera spennandi og megnaði Tummas í seinastu pílunum at strúka framvið Eirik og vinna dystin 90-89.

Gullfinalan: Sjúrður-Bogi 109-101.